# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Johanna Hansen**, ættað av Strondum, búsitandi í Havn, andaðist á Landsjúkrahúsinum 22. juli, 66 ára gomul. Kistan kemur í Vesturkirkjuna hósdagin klokkan 18. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 14 úr Vesturkirkjuni.

Kistan við **Mikkjal Petur Elliassen** fer úr kirkjugarðskapellinum fríggjadagin 27. juli klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra unnusta mín, okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Jóhanna Hansen**
ættað av Strondum,
búsitandi í Havn,

andaðist á Landssjúkrahúsinum 22. juli, 66 ára gomul.
Kistan kemur í Vesturkirkjuna hóskvøldið
26. juli kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
fríggjadagin 27. juli kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Johnny**
**Kári, Heidi og Sanna**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu, tá kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Rasmus Johannesen**
ættaður úr Mykinesi
búsitandi í Havn

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til prest og tykkum øll, ið hjálptu til. Tøkk fyri heilsanir, blómur og gávur til Vesturkirkjuna, og tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Katrina Maria (Trinemia), Jaspur**
**og Janet Fríða**

**Dagurin**

**27. juli. Marta.** Eitt av systkinunum í Betániu; hon sum gjørdi sær stríð og ónáðir av mongum



# Realskúlaframsýningin 1916-66

Stóra myndaframsýningin av millum- og realskúlanæmingum hjá Jórunn Dánjalsdóttir læt upp í Kommunuskúlanum mánakvøldið 23. juli, og framsýningin er opin til og við sunnudagin 5. august.

**Opið er soleiðis:** 24. til 31. juli kl. 15–20, 1. til 4. august kl. 10-20, og 5. august kl. 15-20.

# Ólavsøkuframsýning í Listaglugganum

TÍÐINDASKRIV

Í samband við ólavsøkuna verður ein listaframsýning í Listaglugganum í N. Finsensgøtu 25 í Havn.

Listafólkini, ið sýna fram, umboða ein breiðan og týðandi part av føroyskari, dygdargóðari myndlist. Tey eru Amariel Norðoy, Anker Mortensen, Eyðun av Reyni, Eli Smith, Gunnar Streymoy, Ingálvur av Reyni, Jógvan A. Skaale, Kári Svensson, Olivar við Neyst, Tórbjørn Olsen og Zacharias Heinesen.

Meðan teir flestu málningarnir eru gjørdir til hesa framsýningina, eru eisini nakrir eldri málningar hjá Jógvani A. Skaale og Ingálvi av Reyni, sála, við á framsýningini.

Framsýningin letur upp hósdagin 26. juli kl. 16.00. Fríggjadagin 27. juli er framsýningin opin kl. 14.00 – 17.00. Ólavsøkuaftan og ólavsøkudag er opið frá kl. 15.00 – 20.00. Annars verður gjørligt at síggja framsýningina til umleið miðjan august.



# Bindiklubbi á internetinum

Í hesum døgum eru nógv ferðafólk í Føroyum, og tað kunnu vera sera ein ymsikar orsøkir til at tey eru her. Summi koma við einum serligum endamáli.

Nakrar kvinnur úr ymiskum londum, sum hava hitt hvørja aðra í internetinum og eru limir í einum "intern etbindilkubba"vóru her í sambandi við eina ferð í Orknoyggjum, Hetlandi og Føroyum, har tær m.a. vitjaðu heimavirkir og sóu hvussu ullin verður viðgjørd í teimum ymisku londunum.

Ein amerikanari, Gregg A. Smith frá Indina í USA, er limur í felagsskapinum "Traveler`s Century Club", sum hevur til endamál at vitja øll heimsins lond. Tá hann var her, hevði hann verið í 167 londum.

**mg**



*Her eru "netbindiklubbadamurnar" uttan fyri bygdahúsið í Hósvík, f.v.: Nance Tepaz, USA, Kathi Reyes, USA, Elizabeth Lovick, Orknoyggjar, Katherine Montgomery, USA, Helga Havksdóttir, Ísland og Janice Annel, Orknoyggjar*

*Mynd: Tora Tourist Traffic*



*Gregg A. Smith hevði vitjað í 167 londum, tá hann var í Føroyum. Her er hann á Norðoya Heimavirki í Klaksvík saman við Mariu Marsten*

*Mynd: Tora Tourist Traffic*

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Tøkk

Øllum teimum mongu, sum á ymiskan hátt mintust meg á mínum 80 ára føðingardegi takki eg hjartaliga

**Heilsan**
**Palma Dal-Christiansen**